Sosialurin



# Viðmerking til Jústinus

SOFUS DEBES JOHANNESEN



Væntaði ongantíð at viðmerking mín til Jústinus um rusk fór at fara óátalað fram við borðinum, men hevði satt at siga ikki roknað við slíkari breiðsíðu frá honum, so helst man eg hava rakt okkurt líktorn hjá honum.

Fyri at byrja við endanum, so hevði grein mín onki við kommunuval at gera, men vildi bert vísa á, at myndarøðin hjá Sosialinum er á rættiliga góðari leið, hvat óruddi viðvíkur, eisini hvat viðvíkur teimum bygdum, sum tú helst sást, at fototólið hjá blaðnum sá burtur frá.

Eg taki fult undir við tær Jústinus, at eisini í Sunda kommunu (og aðra staðni við) er nógv, ið eigur at vera nógv ruddiligari, enn tað er nú, havi heldur ikki sagt nakað ímóti tí. Nakað er betra, síðani Sosialurin hevur víst myndarøðina úr kommununi, og tað er at fegnast um, og so mega vit bert vóna at enn fleiri batar á hesum økinum verða at síggja í framtíðini.

Síðani leggur tú eftir smoltstøðini við Gjógv. Hon brýtur ongar byggisamtyktir og liggur har júst eftir góðkenningum frá øllum friðingarmyndugleikum. Tú vildi heldur, at hon lá longur frá ánni, yvir móti Elementvirkinum. Men tað er m.a. orsaka av Yvirfriðingarnevndini, at hon ikki liggur nærri Elementvirkinum, tí hon mátti ikki liggja niðan fyri kirkjuna og kirkjugarðin, segði Yvirfriðingarnevndin.

Um friðingarmyndugleikarnir eru kompetentir ella ikki skal eg ikki meta um; setið meg ikki føran fyri á sama hátt sum tú, Jústinus, at seta meg sum yvirdómara á hesum øki.

Men nú vit tosa um friðingarmyndugleikar, so liggur Elementvirkið har beint eystan fyri kirkjuna, bara tí at friðingarmyndugleikarnir ikki vildu ganga stovnaranum av virkinum á møti við at leggja tað í Hulduheygnum, tí tað lá ov nær ánni. Eg haldi, at har hevði virkið skemmað minni enn beint við kirkjuna, men har eru Jústinum og teir eftir hansara tykki ókompetentu friðingarmyndugleikar á einum máli!

Vit kunnu ikki friðað bygdirnar so nógv, at onki arbeiðspláss kann skapast í teimum, og eg haldi ikki, at smoltstøðin skemmar bygdarmyndina meira enn neyðugt, tá hugsað verður um tørvin at skapa vinnumøguleikar.

Men hinvegin skulu øll arbeiðspláss royna at órudda sum minst, ella at hava óruddið innandura. Tey viðurskiftini kundu verið betri á smoltstøðini við Gjógv, bæði nú og ta tíðina, tá eg hevði nakað við hana at gera!

At enda haldi eg, at vit hóast alt kunnu fegnast um tey fáu framstig, ið hend eru seinastu árini. Tiltakið “Best røkta bygd” hevur verið við at fáa ruddingardagar sum fastan tátt í nógvum kommunum, og eg ivist ikki í, at hetta tiltakið hjá Sosialinum eisini fer at flyta okkum rættan veg í hesum spurninginum.

Heldur enn bara at finnast at, tá onnur vísa á órudd kring landið, eiga vit øll at taka í egnan barm og royna at betra um støðuna! Hetta er eisini galdandi fyri títt heimaumhvørvi, Jústinus!

**05.11.2008**

# Javnvág í tíðindaflutningin?

HØGNI HOYDAL



Havi verið burturstaddur í arbeiðsørindum á fólkatingi, og gjørdist satt at siga eitt sindur kløkkur, tá eg afturkomin sá “matarleparnar” hjá Dimmu og Sosialinum í sølubúðunum týsdagin.

Í Dimmu varð yvirskrivtin um ein landstýrismann og møguligar trupulleikar á almennum døgurða uttanlands, sum eisini fylti tíðindini í øðrum miðlum. Men í Sosialinum var yvirskrivtin á matarlepanum, at “Tobbi roykti hassj!”

Nú kendi eg fleiri ára gomlu søguna um, at Tobbi roykti hassj óvart, tí hann hevði tikið skeivan ballpakka á eini kafé. Og í sjálvari greinini í blaðnum verður eisni greitt frá, at hetta er ein skemtilig søga, ið Torbjørn Jacobsen sjálvur hevði sagt frá á Rás2 hjá Miðlahúsinum.

Men soleiðis stóð søgan ikki fram á matarlepunum í sølubúðunum.

Tískil kann eg ikki koma til aðra niðurstøðu enn, at her er talan um onkra heilt serliga útgávu av annars týdningarmikla journalistiska hugtakinum “javnvág í tíðindaflutninginum”.

## Ikki nóg dekkandi matarlepi

Høgni Hoydal ger vart við ikki nóg dekkandi yvirskrift okkara á matarlepanum: “Tobbi roykti hassj” í vikuni. Vit kunnu geva Høgna Hoydal og øðrum lesarum rætt í, at henda yvirskrift var ikki nóg dekkandi. Í bakspeglinum duga eisini vit at síggja, at einsamøll gav hon jú lesarum ta fatan, at Tobbi var hassjroykari og ikki at hetta var av óvart. Hon átti tí kanska heldur at itið: “Tobbi roykti hassj av óvart”. At henda søgan kom í blaðið sama dag, sum aðrir miðlar viðgjørdi eitt annað rúsmál, var heilt av tilvild. Meira er ikki at siga um tað.

**Blaðstj.**

# Suðuroy annað uppiborið

FRANK DAVIDSEN

Er »Bacalao« tað mest rationella virki, sjálvur arbeiddi eg fyri umleið 45 árum síðani á »Bacalao« nú høvuðssæti hjá Faroe Seafood. Áðrenn tað arbeiddi eg á virkinum hjá N. Niclasen í Sørvági.

Hesi bæði virkir vóru upprunaliga bygd til saltfiskaframleiðslu, fyri síðan at vera nýtt til flakaframleiðslu.

Sostatt hevur »Bacalao« skjótt ein mansaldur á baki.

Fyrr í ár var Snarfrost í Miðvági latið aftur, sjálvt um tað virkið var sera rationelt og hartil væl rikið.

Nú var so túrurin hjá Flakavirkinum í Vági at fella, eitt virki, ið fyri 15 árum síðani var mett at vera tað mest framkomna virki í Norðanlondum.

Samstundis sum Faroe Seafood hevur gramt seg um manglandi arbeiðsmegi er ein fjøld av kvinnum og monnum í Suðuroynni koyrd út í arbeiðsloysi, saman við teimum ið starvaðust á Snarfrost.

Jú, rætt er, at fiskiskapurin hevur verið slakur, men at »Bacalao« skal vera meira rentabult enn Snarfrost og Flakavirkið í Vági, og at tað harafturat beinleiðis verður sagt, at starvsfólki er orsøkin til vána rentabilitet, tað er langt úti.

Eingin ivi er um, at var »Bacalao« heimahoyrandi í Vági, so var virksemi flutt norður um, tí hetta virki var ov gamalt og ótíðarhóskandi.



musikkur, er ein partur av konseptinum. Alt í alt er hetta kortini eitt nokk so meinaleyst ummæli. Men ummælarin hevur lítið og einki fingið við av tí, sum leikurin er og snýr seg um: Søgugongd, dansur, sangur, koreografi, pallur er líkasum farið yvir høvdið á ummælaranum. Bæði áskoðarar og leikarar eiga at kunna vænta sær eina meira innlitsfulla miðling av eini so stórari leiklistarligai hending, sum Hair hóast alt er.. Hitt ummælið – tað í Sosialinum- hoyrir til hina genruna av inkompetentum ummælum: Tað betrivitandi og niðurgerandi. Her hevur ummælarin sett sær fyri, at hann skal so sanniliga vísa, hvør ið hevur forstand upp á tingini, og leikuppsetingini verða brigslað stórt og smátt frá tíðarfestingina av rúmdarferjuni Columbia, brúki av dialektum til talið av blómutyssum, ið vórðu handaði við endan á frumframførsluni. Alt samalt smálutir, sum eru púra óviðkomandi fyri heildarupplivingina hjá áskoðaranum. Ummælið er gjøgnumgangandi fult av faktuellum feilum, ósakligum uppáhaldum og sjálvmótsøgnum. Enn eina ferð fáa vit nýklassikaran í føroyskari ummælarasøgu: “Her er ov nógv reklamerað – ella brandað, sum tað eitur nú- so skal tað sanniliga verða nógv betur enn hetta.” Og fyri at fáa argumentið at hanga saman gevir ummælarin marknaðarføringini av leikinum eitt vavi, sum einki samband hevur við veruleikan. Tann størsta sjálvmótsøgnin í ummælinum fellur beinanvegin í eyguni – ummælarin brigslar leikinum, at hann er ov borgarligur, men brennir síðani út í eitt álop á leikin, sum ikki er annað ein long umskrivað útsøgn av fremstu boðorðunum í smáborgarligaru hugmyndafrøðini – Jantelógini. Ummælarin tykist ikki hava annan boðskap enn: Tit Hair-leikarar skulu ikki halda, at tit eru nakað! Ummælarin er mær vitandi púra óroyndur innan bæði ummæli og sjónleik, og ummælið – hóast tann tilgjørda klókskapin- ber ikki boð um nakra vitan um ella innlit í sjónleik ella í sangleikir sum leiklistagrein. Eg fari ikki at brigsla einum óroyndum ummælara, at hann sigur sína hjartans meining – hóast hon er ósaklig, niðrandi og óundirbygd. Men eg má siga, at eg eri sera vónbrotin av redaktiónini á Sosialinum, at hon setir hetta sum teirra boð upp á eina professionella viðgerð av eini framførslu, sum er tað størsta leiklistarliga satsið á føroyska leikpallinum hetta leikárið.

Eg nevndi, at um ummælini av Glataðu Spælimonnunum vóru øll søgan um tann leikin, so stóð tað eftir, at talan var um ein miseydnaðan leik. Men í minninum á fleiri túsund føroyingum er søgan ein heilt onnur. Á sama hátt trúgvi, at minnini hjá teimum allarflestu av teimum longu 4200 áskoðarunum, ið hava sæð HAIR siga eina heilt aðra søgu um hesa uppsetingina enn ummælini í skrivaðu pressuni. Tí skulu tit leikarar ikki loyva vánaligu pressuumrøðuni at lata so mikið sum eitt milligramm fara av tykkara gleði og stoltleika við tað arbeiðið, ið tit hava gjørt. Og tit áskoðarar, ið enn ikki hava nátt at sæð leikin, latið ikki eitt ófakligt neiligt ummæli snýta tykkum fyri eina ótrúliga uppliving. Tónleikurin er góður, uppsetingin er flott og HAIR er ein uppliving, sum ikki fæst aftur á føroyskum leikpalli í bræði.

At enda havi eg eitt hjartasuff til miðlarnar. Tær flestu sjónleikauppsetingarnar, ið koma á pall, eru úrslitið av einum samstarvi millum listarfólk innan nógvar ymiskar greinar, har leikstjórar, koreografar og leikarar hava lagt hundraðtals tímar í venjingarnar, og stovnar og sjónleikarafeløg hava lagt 100 túsund tals krónur og onkuntíð millióna upphæddir í verkætlanirnar. Alt hetta arbeiðið hevur uppiborið eina virðiliga viðgerð og hevur betri uppiborið enn at vera útsett fyri tilvildarligum og ósakligum niðursáplingum. Áskoðarin/lesarin hevur krav upp á at fáa tær bestu og størstu leikuppsetingarnar miðlaðar av ummælarum, sum hava skil fyri tí, teir viðgera, og sum megna at taka dagar ímillum dygd.